## Haiti

Liggur á vestara parti av oynni Hispaniola í Caribiska Havinum, eystanfyri Cuba. Landið var áður undir fronskum harradømi, men varð góðkent sum sjálvstøðugt ríki so langt afturi sum í 1825. Høvuðsmálið er kreolskt, men ein kemur eisini langt við fronskum. Í Haiti, sum er 17.750 ferkilometrar stórt, búgva umleið 9 mió fólk. Høvuðsstaðurin er Port au Prince, har tað búgva góðar 2 mió fólk. BTÚ hjá landinum er 1500 US dollarar fyri hvønn íbúgvan, og er landið nr. 156 í alheims høpi. Haiti er tjóðveldi. Forsetin eitur René Préval og forsætisráðharrin eitur Jean-Max Bellerive.




## 10 mió úr Danmark

Danski statskassin fer at játta 10 mió danskar krónur í akuttari neyðhjálp til jarðskjálvtarakta økið í Haiti. Samstundis við hetta hevur Danmark boðið sær at senda fólk frá Beredskabsstyrelsen til krepputoymið hjá Sameindu Tjóðum í økinum.

# Helviti á jørð

**Tey, sum hildu helviti vera undir jørð fóru skeiv. Í hesum døgum hevur illimaður bygt sær býli í Haiti, har skríggini frá teimum livandi hoyrast fram um neyðarrópini úr húsaleivdunum og bønirnar um hjálp frá Harranum og umheiminum**

NÁTTÚRUVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í gøtunum liggja røðir av deyðum. Kvinnum, monnum og børnum. Millum tey deyðu og øgiliga deyðaroykin liggja smá børn og sova. Tey hava ballað seg hjá deyðu næstringunum. Tí hvar skulu tey fara?

Altjóða tíðindastovurnar siga frá hjartanemandi frásøgnum frá hjálparfólkum, sum streyma til vanlukkurakta høvuðsstaðin í Haiti í hesum tímum.

Eitt nú tíðindafólki frá norska blaðnum VG, sum meta, at hvør einasti borgari eigur onkran kæran undir húsaleivdunum. Eisini verður mett, at í hvørjum húski eru millum fimm og seks fólk deyð. Og í gøtunum mala avvarðandi runt uttan mál ella mið. Tí hvar skulu tey fara?

Útlúgvað hjálparfólk leita desperat við berum hondum í húsatoftunum. Fyri hvønn tíma sum gongur fánar vónin um at finna fólk á lívi.

Hetta í einum landi, sum hevur verið um at hokna undan av neyð og armóð í mannaminni. Av borgarakríggi, harðrendum einaræði, fátækt og hungur, analfabetismu og AIDS.

Hvar skulu tey nú fara?

